## Føroya Bjór við jubileumsøli

Í sambandi við Føroyar Bjór hevur bryggjað í 120 ár, fer bryggjaríðið at gera fýra sløg av serbjóri í avmarkaðari nøgd. Tann fyrsta í røðini er ein írskt inspirerað Ale á 4,6 prosent, ið verður bryggjað við úrvaldum ráværum, fleiri ymiskum maltsløgum, besta vatni og kryddað við trimum humlusløgum. Smakkurin er mildur, lætt kryddaður og javnvigaður við gódum malt og humlusmakki. Sct. Brigid er vælkent írskt halgimenni sum livdi frá ár 453 til 523. Hon var kend fyri síni mongu undur, serliga at gera vatn til bjór. Sct. Brigid verður at fáa ávís støð á fati hetta vikuskiftið og skjótt eisini á fløsku.




## Sjáldsamur fiskur trívist

Ein roynd hjá skotsku umhvørvismyndugleikunum at bjarga tí sjáldsama feskvatnsfiskinum Vendace tykist hava givið góð úrslit. Hetta sjáldsama fiskaslagið er bara staðfest í fýra vøtnum á markinum millum Ongland og Skotland, men fiskurin doyði út í tveimum av vøtnunum. Ein roynd at lata rogn í tvey onnur vøtn í Skotlandi tykist hava eydnast væl, tí longu nú verður sagt, at tað er ikki vandi fyri, at Vendace doyr út, skrivar Reuters.

# Elektron sett varastjóra

**Fyrrverandi stjórin i FT Samskifti, Richard Mortensen, er settur í starv sum varastjóri á Elektron. Við sínum innliti í føroyska marknaðin og drúgvu altjóða royndum, hevur Richard góðar fortreytir til at lofta teimum avbjóðingum, ið standa fyri framman í Føroyum og uttanlands, heldur leiðslan í fyritøkuni**



*1. mars tekur Richard Mortensen við starvi sum varstjóri í P/F Elektron*

*Savnsmynd*

STARVSSETAN
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Mánadagin verður ein nýggjur maður á brúnni í kt-fyritøkuni, P/F Elektron, saman við Niels Christiani Nolsøe, stjóra. Talan er um Richard Mortensen, ið er settur í starv sum varastjóri á Elektron.

Til oktober var Richard Mortensen á Føroya Tele Samskifti. Hann er 46 ára gamal og útbúgvin Cand. Merc frá Handilsháskúlanum í Keypmannahavn í 1988. Áðrenn hetta tók han útbúgving sum bankamaður í Sjóvinnubankanum í 1983.

Elektron kunnaði fyri stuttum um avgerðina at broyta virksemi sítt frá í høvuðsheitum at hava verið veitari til føroyskar peningastovnar og almennar stovnar til at bjóða tænastur til ein breiðari kundaskara bæði í Føroyum og uttanlands. Umframt at hava medábyrgd av dagligu leiðsluni av samlaða virkseminum hjá felagnum fær Richard Mortensen í hesum sambandi ábyrgdina av menning, kundarøkt og sølu av bæði verandi og serliga nýggjum tænastum.

- Elektron er í eini broytingartíð og skal til at virka í kapping við aðrar fyritøkur á handilsligum grundarlagi. Eg komi at arbeiða við nýggju strategiini og fáa størri marknaðarorientering inn í fyritøkuna, har menning av nýggjum og spennandi kt-tænastum verður ein týdningarmikil partur, sigur nýsetti varastjórin á Elektron.

Um setanina av varstjóra, sigur næstformaðurin í nevndini, Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, ið saman við hinum peningastovnunum eigur størsta partin í P/F Elektron.

- Tað snýr seg um at styrkja leiðsluna, nú fyritøkan skal brynja seg til ein marknað við føstum kundum til at kappast um uppgávur við aðrar fyritøkur á marknaðinum, sigur Janus Petersen.

### FAKTA

Stutt um Richard Mortensen

Varastjóri á Elektron 1. mars 2008
Cand. Merc. Handilsháskúlin í Keypmannahavn 1988

Føroya Tele/FT Samskifti : 2001-2008

Arbeiðsroyndir: Eftir student útbúgvin bankamaður í Sjóvinnubankanum í 1983. Management konsulentur í Michael Peters Group í London í tvey ár og í PA Consulting Group í Keypmannahavn í 10 ár. Síðstu árini sum leiðari og partnari á Marketing & Strategy deildini

# Nýggj brúgv til Signabø

**Brúgvin móti Signabø er sum gott sum liðug. Tað manglar bert at fugtisolera betongið, og tað kann ikki gerast, fyrr enn tað verður summar**

BYGGING
*Katrin Johannesen*
*praktikantur*

Stjórin í Landsverk, Oyvindur Brimnes, upplýsir, at orsøkin til at nýggj brúgv varð bygd, er at tann gamla var bæði vánalig og ótíðarhóskandi.

- Nú tá nógvur aktivitetur fer fram í havnini, er tann tunga ferðslan økt munandi, sigur stjórin í Landsverk.

Tað hevur tikið millum tríggjar og fýra mánaðir at byggja brúnna, sum kostar góðar fimm milliónir krónur.

Eisini norði í fossá, sunnan fyri Haldórsvík, verður ein nýggj brúgv bygd. Hendan brúgvin er á leið somu støði sum tann til Signabø og verður væntandi liðug tíðliga í summar.



*Brúgvin við Oyrareingir í Kollafirði á veg móti Signabø*
*Mynd: Marika Hill og Caroline Eriksson, praktikantar*



*Naja Marie Aidt*

## Naja Marie Aidt vann bókmentavirðisløn

**Danski rithøvundurin Naja Marie Aidt vann Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri stuttsøgusavnið »Bavian«**

Í grundgevingini fyri at lata verkinum virðislønina, verður millum annað sagt:

- Tær 15 stuttsøgurnar taka støði í einum heimi, sum í allar mátar líkist veruleikanum. Naja Marie Aidt skrivar í eini yndisligari og ófrættakendari realismu, sum dregur undirtónarnar í veruleikanum upp, so tú kennir, hvussu vanlukkan lúrir beint undir gerandisdegnum.

Virðislønin verður handað Naja Marie Aidt á samkomu í Norðurlandaráðnum í oktober mánað

Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins er á 350.000 krónir.

ave

Lesið Sosialin -so eru tit við!